# »Fyri og eftir Norðoyatunnilin«

**Týskvøldið verður kjakfundur um ferðslutrygd við heitinum »Fyri og eftir Norðoyatunnilin« í Miðlahúsinum í Vágsbotni í Havn**

FERÐSLUTRYGD
*Tíðindaskriv*



*Orðaskiftið verður í Miðlahúsinum um ferðslutrygd fyri og eftir Norðoyatunnilin*
*Mynd Snorri Brend*

Týskvøldið 7. februar klokkan 19.30 skipar Ráðið fyri Ferðslutrygd fyri kjakfundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Á fundinum verður framløga og kjakborð við luttøku av Landsverki, Politinum, umboði fyri Felagskommununa í Vágum og Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, fer at vísa á vandamál og loysnir í samband við øktu ferðsluna, tá Norðoyatunnilin letur upp.

Jan Fossaberg og Jan Poulsen, løgreglumenn, fara at siga frá royndum í sambandi við ferðslumynstur og atburð fyri og eftir Vágatunnilin.

Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvágs Kommunu, fer at greiða frá í hvønn mun ferðslan er broytt og háttar sær á Vágum, síðani undirsjóartunnilin læt upp.

Jón Kragesteen, dagligur leiðari á RFF, fer at vísa á týdningin av upplýsing og fyribyrging í ferðsluni.

Orðstýrari á fundinum verður Hilmar Jan Hansen.

Eftir fundin verða kaffi og køkur at fáa.

# Lýggjasti januarmánaður í 60 ár

VEÐURLAG

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Um ferðaskrivstovurnar hava orsøk til at óttast fyri ikki at selja nakrar ferðir til tey heitu londini sunnanfyri, er ikki gott at vita. Í hvussu er kunnu vit staðfesta, nú januar er farin afturum, at hetta var lýggjasti januarmánaður síðani 1946.

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sigur, at miðalhitin fyri bæði nátt og dag í januar í ár var 6,2 hitastig. Hetta er nógv lýggjari enn í januar í fjør, tá miðalhitin var 3,8 hitastig, sum hinvegin verður mett at vera vanligt í januarmánaði í Føroyum.

Avfallið í januar í ár varð tó mett at vera, sum tað plagar, men annars kann vera trupult at meta um orsøkirnar til lýkkuna.

Í øllum førum gjørdi lágættin nógv um seg, og tá plagar at vera heitari í veðrinum.

## Viva La Republica er næstan útseld

Fløgan hjá 200 Viva La Republica er sambært heimasíðuni hjá bólkinum um at verða útseld. Bólkurin prentaði 2000 eintøk av fløguni, og í síðstu viku vóru einans 30 eintøk eftir á goymslu.

Tó biðir bólkurin fólk um at halda seg rólig, tí fløgan verður nú send til endurprentingar. Tað er heldur sjáldsamt, at rokkfløgur selja so nógv eintøk.

**nud**

ÚTSØLUENDABRESTUR

NÚ 1/3 AV VANLIGA PRÍSINUM

NOA NOA

miniature

GENTUR

2-12 ár

OPIÐ:
Fríggjadag 3. februar 2006 10 - 19
Leygardag 4. februar 2006 10 - 19

Endar hósdagin
tann 9. februar 2006

NOA NOA®
Tróndargøta 29
tel 318200